# Almannastovan má bera sín part av byrðuni

**Grundin til, at sparingarnar á Almannastovuni verða so ogvusligar, eru, at sparingar, sum skuldu verðið gjørdar í ár, eru útsettar út til næsta ár, so at alt fellur saman**

SPARINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Leiðslan á Almannastovuni hevur valt at útseta sparingar í ár til næsta ár og tí verður sparingin so ógvuslig, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum*

– Vit hava ein búskaparligan veruleika at halda okkum til.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, sigur, at Almannastovan má bera sín part av sparingingunum, eins og allir aðrir stovnar hava gjørt.

Hann viðgongur samstundis, at tað hóvar honum ógvuliga illa at gera sparingar á Almannastovuni.

– Men stígur er komin í búskapin og so ber heilt einfalt ikki til at lata sum onki, og so má eisini Almannastovan bera sín part av byrðunum.

Ført hevur verið fram, at sparingarnar, sum ætlanin er at gera á Almannastovuni, fara at føra til at seks-átta fólk verða søgd upp.

Hans Pauli Strøm vísir á, at nú fíggjarlógin skuldi gerast, eru tað bara skúlaverkið, heilsuverkið, eldrarøktin og serforsorgin, sum hava fingið fult endurgjald fyri tær lønarhækkingarnar, sum eru komnar í gildi.

– Allir aðrir stovnar hava ikki fingið meiri pening at játta yvir, hóast lønin er hækkað og sostatt mugu teir finna sparingar, sum samsvarar við lønarhækkingina.

### Sparingar fella saman

Hann sigur, at skuldi Almannastovan havt fingið fult endurgjald fyri lønarhækkingina, skuldi hon fingið 838.000 krónur afturat næsta ár.

– Tað eru hesar 838.000 krónurnar, sum Almannastovan skal spara næsta ár. At hetta so skal føra til, at seks-átta fólk verða søgd úr starvi, hevur sína orsøk. Og orsøkin er, at leiðslan á Almannastovuni hevur hevur skotið sparingar, sum skuldi gerast í ár, út til næsta ár, so at allar sparingarnar fella saman og tí virkar tað so ógvusligt.

– Orsøkin til at sparingarnar næsta ár verða so ógvusligar, er, at leiðslan hevur ikki lagað virksemið í ár ár til sparingarnar, sum eru gjørdar í ár. Tað er eitt val, sum leiðslan hevur gjørt, men avleiðingin er, at allar sparingarnar so fella saman í 2005.

Landsstýrismaðurin veit, at Almannastovan hevur ikki brúk fyri sparingum, men hevur brúk fyri fleiri fólki.

– Men sum støðan er nú, røkkur búskapurin ikki til og tí er neyðugt at seta sparingar í verk, og her má Almannastovan bera sín part.

– Ein minni sparing í 2004 og ein minni sparing í 2005, hevði væl givið sama endaúrslit.

– Tað skal eg ikki gera viðmerkingar til. Men at koyra seks- átta fólk til hús í einum høggi, er so mátin, sum leiðslan á Almannastovuni hevur valt, heldur enn at gjøgnumføra nakrar av sparingunum í ár og nakrar næsta ár.

Hann leggur afturat, at hetta er ikki ein atfinning at leiðsluni, tí leggja seg út í raksturin á Almannastovuni, hvørki vil ella kann hann.

Hans Pauli Strøm vísir á, at í 2004, ætlaði fíggjarnevndin at Almannastovan skuldi spara 500.000 krónur eyka. men ta játtanina fekk hann upp á aftur.

Næsta ár ætlar samgongan at veita 60 milliónir í skattalætta. Er tað rætt at veita skattalættar, samstundis sum tað er neyðugt at spara í grundleggjandi tænastum, sum Almannastovan veitir?

– Skattalættin er ein semja í samgonguni, tí mett verður, at hann fer at seta skump í virksemið.

Og fleiri viðmerkingar vil Hans Pauli Strøm ikki gera til skattalættan.

– Eg kann bara vísa til, at samstundis sum fyrisitingin á øllum økjum er beinleiðis lækkað 10%, er fyrisitingin hjá Almannastovuni ikki lækkað. Einasta sparing á Almannastovuni er, at hon hevur ikki fingið endurgjald fyri eina lønarhækking. Sostatt er Almannastovan í roynd og veru sloppin lættari enn aðrir stovnar.

### Ikki bara talan um starvsfólk

Tey, sum hava við Almannastovuna at gera, vænta, at sparingarnar fara at føra við sær, at avgreiðslutíðin á Almannastovuni fer at longjast munandi?

– Tað er ein spurningur um, hvussu leiðslan á Almannastovuni leggur arbeiðið til rættis og tað skal eg ikki leggja meg út í. Men talan er ikki bara um talið á starvsfólkið. Talan er eisini um mannagongdir - og sparingin fyri næsta ár er altso 838.000 krónur.

– Men í summum førum gevur lógarverkið Almannastovuni ov nógv arbeiðið, eitt nú við eftirrokningum av hvørjum einstøkum viðskiftafólki.

Hann sigur, at landsstýrið arbeiðir við at gera lógarverkið einfaldari, so at tað verður lættari hjá Almannastovuni at umsita.

– Men Almanna- og heilsuverkið eru meiri enn helmingurin av fíggjarlógini og tað er heilt óhugsandi, at tey økini skulu sleppa undan, tá ið vit annars verða noydd at finna sparingar, tí stígur er komin í búskapin.

– Og tað verða vit noydd at boyggja okkum fyri. Tá ið heilar og hálvar vinnur hvørva, ber ikki til at lata sum einki, sigur Hans Pauli Strøm.

# Ósemja í samgonguni um tunlar

**Heðin Zachariasan, tingmaður í samgonguni, góðtekur als ikki, at tunnilin til Tjørnuvík verður skumpaður afturum tunnil til Viðareiðis og tunnil til Dals**

RAÐFESTING
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tunnilin til Tjørnuvíkar skal gerast, áðrenn tunnil til Dals og tunnil til Viðareiðis verður gjørdur.

Tað slær Heðin Zachariasen, løgtingsmaður, fast.

Heðin Zachariasen er tingmaður fyri fólkaflokkin í Norðstreymoy og sostatt er hann eisini limur í samgonguni.

Og hann er grundleggjandi ósamdur í teirri raðfesting, sum samgongan hevur gjørt í sambandi við tunlar í Føroyum.

Í Sosialinum fyrr í vikuni greiddu vit frá, at landsstýrið hevur sett pening av til forkanningar í sambandi við tunnil til Dals og í sambandi við tunnil til Viðareiðis.

Bjarni Djurholm greiddi eisini frá, at tá ið Hovstunnilin í Suðuroy verður liðugur um eini tvey ár, skal farast undir tunnil til Viðareiðis.

Hetta góðtekur Heðin Zachariasen als ikki.

Hann sigur, at tað er ongin ivi um, at Tjørnuvíkartunnilin skal raðfestast framum bæði Viðareiðistunnilin og Dalstunnilin.

– Eg havi onki ímóti, at samgongan raðfestir tunnil til Dals og tunnil til Viðareiðis. Men vit hava ongar forkanningar gjørdar, hvørki í Dali ella í Viðareiði.

– Hinvegin eru forkanningar gjørdar í sambandi við tunnil til Tjørnuvíkar og tær kanningarnar eru lidnar.

Hetta er ein tunnil, sum politiskt hevur verið frammi í fleiri ár og tað hevur ligið í kortunum, at farast skuldi undir tað projektið. Tí er ongin ivi um, at hann skal raðfestast frammanfyri bæði Dal og Viðareiði, sigur løgtingsmaðurin úr Norðstreymoy.

– Tað eigur landsstýrismaðurin at gera sær púra greitt, leggur hann afturat, tí eg góðtaki ikki, at ein tunnil, har kanningarnar eru lidnar, verður skumpaður afturum tunlar, sum enn ikki eru kannaðir.

Hann sigur, at hann fær seg ikki at trúgva, at tað er við vilja, at Tjørnuvíkartunnilin ikki er nevndur í fíggjarlógini.

– Eg haldi, at landsstýrið rætt og slætt hevur gloymt tað.

Heðin Zachariasen ásannar kortini, at hann er limur í eini samgongu og hann fer ikki at seta samgonguna í vága.

– Men sum limur í samgonguni krevji eg at verða hoyrdur, leggur hann afturat.



*Heðin Zachariasen krevur, at tunnil til Tjørvnuvíkar verður gjørdur, áðrenn tunnil til Dals og tunnil til Viðareiðis*

# Standa sterkari í kappingini

**Televarpið kann nú bjóða donsku rásirnar DR 1 og 2 fyri munandi lægri prís enn vanligu parabolskipaninar. Laila Hentze, stjóri, sigur, at samráðingarnar hava tikið langa tíð, og hon heldur, at við hesum stendur Televarpið sterkari í kappingini**

TELEVARPIÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*





*Televarpið fekk avtaluna um DR 1 og 2 í lag seinasta fríggjadag. Haldarar hjá varpinum sleppa at síggja báðar rásirnar ókeypis inntil 1. desember, tá mánaðarliga gjaldið hækkar við 30 krónum á teimum fýra grundpakkunum*

*Mynd: Jens K. Vang*

Haldarar hjá Televarpinum síggja nú DR 1 og 2. Fríggjadagin kom avtala í lag millum partarnar, at allir fýra grundpakkarnir hjá Televarpinum framyvir fara at innihalda donsku rásirnar.

Televarpið hevur arbeitt við at fáa hesar rásirnar í langa tíð. Samráðingarnar hava drigið út av ymsum orsøkum, men hesuferð bar sum sagt til.

Tað fegnast Laila Hentze, stjóri, um. Hon sigur, at hetta er ein liður í royndini hjá Televarpinum at fáa enn fleiri norðurlendskar rásir í teirra grundpakkar. Eitt nú hava tey sett nøsina upp eftir at fáa norsku rásina NRK. Tað verður tó ikki rættiliga enn, sambært Lailu. Men hon væntar, at tað verður einaferð komandi ár.

Laila Hentze sigur, at hetta hevur stóran týdning fyri Televarpið. Hon heldur, at við DR 1 og 2 rásunum hava tey fingið eina betur vøru at bjóða kundunum. Eisini er vøran vorðin áhugaverd fyri enn fleiri møguligum kundum. Hartil heldur hon, at Televarpið nú stendur sterkari í kappingini við tað, at tey kunnu bjóða fleiri rásir fyri ein rímuligan prís.

– Vit hava kempað fyri hesum og at kunna veita eina góða tænastu, og tað meti eg hervið er eydnast okkum. Men hetta er sum sagt bert ein liður í at fáa enn fleiri norðurlendskar rásir í okkara pakkar, sigur Laila Hentze.

### Betur tænasta

Grundpakkarnir hjá Televarpinum dýrka nakað, nú DR 1 og 2 er komnar afturat. Men samanborið við prísin, sum vanligir paraboleigarar skulu gjalda fyri at fáa tær báðar rásirnar, má sigast, at Televarpið hevur munandi betur tilboð.

– Ein av orsøkunum til, at samráðingarnar drógu út, var nevniliga prísurin. Vit vildu ikki, at okkara kundar, sum longu frammanundan gjalda millum knapt 200 og knapt 300 krónur um mánaðin, skulu uppliva eina stóra príshækking fyri tvær rásir, greiðir Laila frá. Men nakað dýrkar mánaðargjaldið kortini.

Sum dømi kann nevnast, at um ein haldari hevur Ælaboga pakkan, so kostar hesin í dag 269 krónur um mánaðin. Donsku rásirnar merkja ein eykakostnað upp á 30 krónur. Men Laila Hentze sigur, at prísurin hækkar ikki fyrr enn 1. desember.

– Fyri at veita kundum okkara eina góða tænastu, hava vit gjørt av, at teir kunnu síggja hesar báðar rásirnar ókeypis inntil 1. desember, tá gjaldið hækkar við teimum 30 krónunum, sigur Laila Hentze, stjóri á Televarpinum.

# Manningin á Norrønu framúr

**Tey bæði Sylvi Berit og Gustav Moland úr Noregi vóru tvey av ferðafólkunum við Norrønu, tá hon vendi við aftur til Føroya buldruta túrin fyrr í vikuni. Tey siga, at tey ongantíð vóru bangin, men tað var ólagaligt at vera umborð. Tey rósa tó manningini og siga, at tey vóru sera professionell allatíðina**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Norrøna vendi aftur til Føroya týsnáttina vegna illveður, tá hon var á veg til Íslands.Ferðafólkini fingu ein buldrutan túr, men alt gekk kortini væl.

Tvey av ferðafólkunum, sum vóru við, vóru norsku hjúnini Sylvi Berit og Gustav Moland. Tey greiða frá, at tað byrjaði at rulla beinanvegin, men tað var ikki fyrr enn seint út á kvøldið, at tað bleiv rættiliga ógvusligt. Tó leggja tey dent á, at tey allatíðina fingu at vita, hvat og hvussu frá manningini, og yvirhøvur halda tey, at manningin á Norrønu var sera professionell og dugdi væl at sýna umsorgan fyri ferðafólkunum.

Eisini fingu ferðafólkini longu framman undan fráferðini at vita, at skipið fór at verða seinkað til Íslands vegna veður.

– Av tí, at tað bleiv sagt okkum frammanundan, so var ein innstillaður uppá, at tað fór ikki at verða gott veður, siga norsku hjúnini.

### Ódn

– Vit fóru tíðliga í song, tí songin var tað besta staðið at vera í, meðan tað rullaði so illa, sigur Sylvi Berit.

Gustav greiðir frá, at tað rullaði bara meira og meira. So illa, at tey noyddust at halda sær fast í songini. Lutir byrjaðu at koppa og skreiða aftur og fram í kamarinum.

Gustav greiðir frá, at tey svóvu á sjeynda dekki, so tey sóu væl. Havið var øgiligt at síggja, og frá einum av manningini fingu tey at vita, at talan var um rættiligt ódnarveður.

– Hann segði okkum, at vindmegin lá upp móti ódn, og at aldurnar vóru upp móti 16 metrum høgar, greiðir Gustav frá.

Hóast tað vóru tey bæði ikki bangin. Men siga, at serliga ljóðini og ristingarnar í skipinum vóru ólagaligar.

– Men eg hevði tað nú gott kortini, tí Gustav bleiv við at siga við meg, at tað var ikki vandi á ferð, sigur Sylvi Berit smílandi.

Gustav heldur, at skipið kendist trygt og haldgott, og tí er hann ikki í iva um, at Norrøna er eitt sjógott skip.

– Ein skal minnast til, at tá skiparin tekur frá, er tað ikki tí, at skipið ikki megnar tað, men tí at ferðafólkini ikki skulu kenna tað so øgiligt umborð, sigur hann.

### Vælskipað

Tað ringasta rullið var mest um náttina, so tað bleiv ikki nógvur svøvnur.

– Mitt í øllum varnaðust vit, at tað ikki var so ringt meira. Tá róptu tey í hátalaranum, at teir høvdu vent skipinum, og at vit fingu nærri boð seinni, greiðir Gustav frá.

Sylvi Berit heldur fram, at síðani boðaðu tey frá, at kaffi og køkur vóru at fáa á fimta dekki.

– Tað var sera umhugsið av teimum, haldi eg. Ikki so nógv fyri kaffi og køkurnar, men meira hetta, at fólk savnaðust og kundu tosa um hetta, sigur hon og vísir á, at tað eru fleiri ferðafólk, sum ferðast einsamøll. Hon ivast ikki í, at tað hevur verið gott fyri serliga tey at kunna savnast við hinum ferðafólkunum.

Hatta halda tey vera eitt greitt tekin um umsorgan fyri ferðafólkunum.

Sylvi Berit og Gustav siga, at aftaná hesa lítlu løtuna við kaffimunninum fóru tey aftur í koyggjuna og tá bar til at sova.

– Og ístaðinfyri at vitja Ísland, fingu vit so tveir deiligar dagar afturat í Føroyum, siga tey brosandi.

Bæði skulu tey so heim til Bergens við Norrønu í kvøld, og tí siga tey seg als ikki stúra fyri.



*Á einum av útferðunum hesar eykadagarnar í Føroyum, varð stegðað við Áir, har Sylvi Berit og Gustav sóu Alv skúlan og gomlu hvalastøðina. Tað var heilt serligt fyri Sylvi Berit, tí abbi hennara arbeiddi eitt summar í 1920-unum á hvalastøðini við Áir*

*Mynd: Sámal Bláhamar*